

*- Tey ungu hava ongar fordómar. Vit vórðu stýrd av fordómun. Tey ungu eru so frí og fræls í Føroyum í dag, og tað er vælsignað. Tað hevur verið stuttligt at vera við í Silvitni, sigur Frits Johannesen*

# Silvitni - eitt skapanarverk... ein íbygdur litfagur heimur

17. – 19. august var Silvitni á palli í Mentanarhúsinum í Fuglafjørði. 24 ára gamla Kristina Joensen var leikstjóri. Eini 30 fólk vóru á ymiskan hátt uppi í leikinum. Vant varð hvønn dag í tvær vikur. Burtursæð frá tónleikabólkinum, var talan um leikfólk. Jan Rúni Poulsen úr Fuglafjørði fekk hinir í bólkinum Ben-Jammin við. Teir skaptu tónleik til leikin, eftir rytmun leikstjórin ynskti. Væl eydnaðist hjá teimum og aukustikkurin var í topp

SJÓNLEIKUR
*Maud Næs*

Fýra dansarar, seks sangarar leiktu hulduheimin, øll vinfólk og fyrrverandi floksfelagar hjá Kristinu Joensen. Koregrafurin Ruth Hansen hevur m. a. dansað hjá Nic Jay. 7. flokkur síðsta skúlaár í Fuglafirði, gjørdu íbygdu huldusteinarnir til pallin. Búnarnir átti Kristina frá hugskoti, til teir við gandamegi strálaðu á leikpallinum, sum glitrandi litríkar perlur, bornar av leikandi, førgrum, vælviljandi og evnaríkum ungdómi í Fuglafjørði. Aftan á sýningina var aktión av búnunum. Uml. 500 fólk sóu leikin.

Áskoðararnir vavdust inn í ein hulduheim við dansi, sangi, tónleik, sjónleik....og orð við sterkari skapanarmegi. Rúnarbundin,



sótu børn sum vaksin, og tíðin fleyg avstað.

**Byrjan**

Á pallinum liggja litríkir kropnir mannakroppar í einum ævintýra landslagi ímyndandi hulduheimin. Tá trínur Kristina Joensen, leikstjóri, inn á pallin. Ein nútíðar huldugenta í nýsniðgivnum skeljakjóla, sum sniggevi og vina hennara, Eyðbjørg, hevur skapt til høvi. Hábarslig við náttúrligari greiðari rødd, sigur hon frá, hvussu huldutiltakið hevur sæð dagsins ljós. Kemur so við leiðbeining til tey umleið 40 børnini, ið spent troka seg fram á pallin. Salurin í Mentanarhúsinum í Fuglafjørði er fullsettur og børnini sita ytst úti á pallinum frammanfyri fremstu sessirnir. Tað er leygarkvøld og síðsta sýning.